# Hvat fer í veruleikanum

**Trupult er tað heilt at fáa greitt svar hesum viðvíkjandi. Men líkt er til at ein avgreiðsla er ávegis. Umstrídda fangalegan fer helst at koma alt meiri fram komandi tíðina: Ein røð av rættarmálum er møguliga ávegis, eftir ætlan stendur tað fyrsta málið fyri framman í næsta mánað. Teir ákærdu skulu stillast fyri ein serlig hernaðardómstól**



## Kríggið móti yvirgangi



**Johan Jacobsen**
johan@sosialurin.fo

Fyrireikingar fara nú fram til hesi komandi rættarmál á Guantanamo – legan kring dómstólin, »Camp Justice«, tekur skap.

### Gerandisdagur á Guantanamo

Guantanamo var einaferð bert ein herflotastøð, ið gav vaktarskipum brennievni. Men stutt eftir 11. septembur í 2001, 11. januar 2002, komu teir fyrstu fangarnir úr Afghanistan. Guantanamo gjørdist bráddliga eitt týðandi stað í krígnum ímóti yvirgangi.

Nú um dagarnar eru arbeiðsmenn í full sving við at seta eina høll upp. Eina høll í stíl við okkara mongu fýrkantaðu metalkassar, har fyritøkur, heilsølur, fiska -og flakavirkir halda til. Hetta fer fram á eini fløtu, sum fyrr var brúkt sum flogvøll, nú verður fløtan helst grund til hernaðarligar dómstólar, ið kunnu lýsast sum serligir. Høllin skal hýsa einum serliga tryggjaðum rættarsali. Her skulu menn, sum eru undir illgruna fyri álvarsligt yvirgangsvirksemi, stillast fyri dómara.

Á tí, sum einaferð var flogvøllur, eru meiri enn hundrað tjøld sett upp til sakførarar, fjølmiðlar og starvsfólk annars, herfrá fara øll hesi at arbeiða og búleikast – seks persónar til hvørt tjaldið. Og tjaldlegan hevur fingið navn – Camp Justice.

Á Guantanamo sita 275 fangar, tá ið talið var hægst sótu uml. 680 inni í klivum. Har arbeiða tils. uml. 2.000, tey flestu eru úr sjóverjuni og herinum, 12 % tíðaravmarkaði arbeiðsfólk, eins og tey, sum seta høllina upp til áðurnevnda rættarsal. Ein flogruta er, við fýra fráferðum um vikuna, millum amerikanska fastlandið, Florida, og Kuba, Guantanamo. Flogfarið tekur einans trettan ferðandi og túrurin heilar tríggjar tímar, tí flogfarið ikki fær flogið inn í kubanskt loftrúm. So tað kennist kanska eitt sindur isolerað at verða eitt av starvsfólkunum á Guantanamo, hóast mann ikki er fangi. Eins og í øðrum hernaðarstøðum úti í heimi, so roynir herleiðslan at bøta um støðuna við at innflyta eitt sindur av tí heimliga. Hendan innflytanin á Guantanamo sæst aftur í seks fast-food matstovum, tveimum uttandura biografum, mini-golf og so ein illa farin golfvøllur við níggju holum.

### »Nuremberg ella Abu Ghraib?«

Blaðið The New Yorker hevur í drúgvari grein hugt nærri eftir núverandi støðuni kring Guantanmo og teimum komandi rættarmálunum. Ein niðurstøða

**FAKTA**

Myndugleikar viðganga alment, at meiri enn 130 av fangunum eru so at siga fangaðir í ongamannalandi – ongar ætlanir eru gjørdar viðvíkjandi hesum fangum